## Fylgja gassskipi

Íslendska vaktar- og bjargingartænastan hevur hildið eygað við einum norskum gasstangaskipi, meðan tað hevur siglt ígjøgnum íslendskt sjóøki á veg úr Noregi til USA. Sum myndin vísir, er Arctic Princess ikki eitt vanligt tangaskip. Skipið er 288 metrar langt og 121.000 tons stórt. Manningin telur 12. Morgunblaðið skrivar, at íslendska vaktar- og bjargingarrtænastan valdi at halda eygað við skipinum, tá tað kom inn í íslendskan sjógv eystanfyri og at fylgja tí vesturum.



## Til Danmarkar at arbeiða

Í danska heilsuverkinum fegnast tey um, at altsamt fleiri svenskir og týskir sjúkrarøktarfrøðingar velja at fara til Danmarkar at leita sær arbeiði. Tøl hjá heilsustýrinum vísa, at í fjør fingu 418 útlendingar loyvi at arbeiða sum sjúkrarøktarfrøðingar í Danmark. Í 2006 var talið 144. Ein talskvinna fyri heilsumyndugleikarnar sigur við Kristeligt Dagblad, at danska heilsuverkið hevur brúk fyri útlendskum sjúkrarøktarfrøðingum fyri at nøkta tørvin. Teir útlendsku sjúkrarøktarfrøðingarnir skulu á skeið í donskum máli og danskari mentan, áðrenn teir fáa arbeiði.



*Grafiski verkstaður Føroya er kendur víða um fyri sína professionellu útgerð og høga listarliga støði*

# Fáa grafiska list fyri limagjald

**Í næstum verður nýtt Grafikkfelag sett á stovn, har limir fáa grafisk listaverk afturfyri sítt limagjald**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri at stuðla grafiska virkseminum í Føroyum bæði moralskt og fíggjarliga, verður eitt grafikkfelag nú stovnað. Og longu nú tykist áhugin fyri nýggja felagnum at vera rættiliga stórur. Á fyrireikandi fundi mikukvøldið vóru eini 50 fólk savnað, og avgjørt var at hava stovnandi aðalfund 14. februar.

Øll, sum hava áhuga at stuðla felagnum kunnu tekna seg sum lim, og tá eru ágóðarnir ikki so fáir. Í uppskotinum til viðtøkur fyri felagið stendur nevniliga, at afturfyri limagjaldið hava limir á hvørjum ári rætt til at velja sær grafikk, ið er framleiddur á Grafiska Verkstaði Føroya í Steinprent, har verkstaðurin heldur til. Eisini kann limagjaldið nýtast sum avsláttur í sambandi við keyp á framsýningunum á Steinprent. Hartil fáa limir eitt prent til gávus av árligu grafikkframsýningini »Myndaódnin«.

Limagjaldið verður ásett á stovnandi aðalfundi.

### Fyrimynd

Grafiski verkstaður Føroya er kendur kring øll Norðurlond fyri sína høgu prentgóðsku og ikki minst fyri listarligu góðskuna á verkum, sum bæði útlendsk og føroysk listafólk hava framleitt á verkstaðnum.

Fyri at tryggja at hetta arbeiðið og høga støðið kann halda fram er neyðugt við bæði moralskum og fíggjarligum stuðli. Tí verður nú farið undir at stovna nýggja grafikkfelagið, sigur Bárður Jákupsson, sum er ein av limunum í fyribilsnevndini hjá felagnum.

– Vit eru nøkur, sum fegin vilja tryggja grafiska arbeiðinum her eina góða framtíð, og tí fóru vit undir at fyrireika eitt felag, sigur Bárður Jákupsson og vísir á, at tað sostatt ikki er Steinprent, sum tekur hetta stigið.

Eftir hansara tykki er júst Grafiski Verkstaður Føroya dømi um ein sera væleydnaðan føroyskan mentanarstovn. Hesi 10 árini, stovnurin hevur virkað, hevur hann livað upp til vóninar, sum stigtakararnir høvdu til altjóða samstarv. Bárður Jákupsson vísir á, at verkstaðurin er heilt serstakur á tann hátt, at hann er ein av teimum heilt fáu í Norðurlondum, sum í dag kunnu bjóða listafólkum rættilig steinprent á litografiskum steinum. Í dag nýta flestu onnur verkstøð av slíkum slag nevniliga aðra tøkni, sum er "lættari" at handfara. At arbeiða á rættiligum litografiskum steinum er hinvegin nakað serligt, sum professionellir grafikarar leggja dent á.

### Tryggja støðið

– Størsta aktivið hjá Grafiska Verkstaði Føroya er tó litografurin Jan Andersson. Hann er ein kapasitetur, sum er víðagitin um norðurlond, og vit eru sera heppin at hava hann her heima í Føroyum, sigur Bárður Jákupsson.

Tað er ikki minst honum fyri at takka, at fleiri kend listafólk hava vitjað og arbeitt á verkstaðnum gjøgnum árini, leggur Bárður Jákupsson afturat.

Nú er vónin so at gera verkstaðin enn meir kendan, so uppaftur fleiri útlendsk listafólk fara at leita sær til Føroyar at arbeiða við serligu útgerðini á Steinprent. Mongu góðu føroysku listafólkini, sum regluliga arbeiða á verkstaðnum fáa sum vera man eisini gleði av, at fíggjarligu umstøðurnar hjá stovninum gerast betri.

Eisini vóna fyrireikararnir, at nýggj fólk áhaldandi verða sett við og koma í læru, so litografiska virksemið á verkstaðnum verður á eins høgum støði, sum higartil.

Í fjør flutti Grafiski verkstaður Føroya í nýggj hølið á Skálatrøð 16. Í rúmligu hølunum hava listafólkini fingið munandi betri arbeiðsumstøður og møguleikarnir at sýna fram eru eisini vorðnir nógv betri. Rættiliga nógv fólk vitja á verkstaðnum og um summarið støkka nógv ferðafólk eisini inn á gólvið, sigur Bárður Jákupsson, sum ikki ivast í, at verkstaðurin eisini er vorðin eitt dygdargott mentanartilboð innan føroyska ferðavinnu.

# Føroyskar bøkur oftari á útsølu

**Føroysku útgávurnar eru nú so nógvar, at stóra várútsølan verður annað hvørt ár framyvir. Sostatt verða útsølubøkurnar eisini nýggjari enn á undanfarnum útsølum**

BØKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nú er ikki longur neyðugt at bíða í trý ár eftir stóru várútsøluni av føroyskum bókum. Avgjørt er nevniliga at hava bókaútsøluna annað hvørt ár framyvir og ikki triðja hvørt ár sum higartil.

### Nýggjari bøkur

Í 1988 varð fyrstu ferð skipað fyri útsølu av føroyskum bókum. Bókhandlarafelagið og Bókadeild Føroya Lærarafelags skipaðu fyri – og hetta var stórhending tá. Nú vóru so nógvar føroyskar bøkur, at til bar at skipa fyri rimmar útsølu við fleiri hundrað bókum.

Enn er føroyski bókamarknaðurin so mikið avmarkaður, at tað ber ikki til at halda útsølu hvørt ár. Tí var føroysk bókaútsøla bara 3. hvørt fram til 2006. Men tíðir broytast, og eftir at fleiri forløg høvdu gjørdu vart við, at hetta var í so leingi at bíða, við tað at bøkur, sum eru akkurát ikki 3 ár, tá ið útsøla er, koma at bíða í næstan seks ár eftir útsølu, varð gjørt av at skipa fyri útsølu annað hvør ár framyvir.

Tað er eitt krav, at bøkurnar, ið verða seldar á útsølu, skulu í minsta lagi vera 2 ára gamlar. Tá ið bøkurnar hava verið í tveimum útsølum, sleppa tær ikki við aftur.

Bókaútsølan var sostatt í 2008, og nú verður hon aftur í døgunum 25. mars til 1. mai 2010. Bókadeild Føroya Lærarafelags sendir í hesum døgum bræv til øll forløg, har boðað verður frá hesum og greitt verður frá treytunum at sleppa upp í part. Lýsing verður eisini sett í bløðini, so fólk, ið kanska eiga bøkur, sum stigtakararnir ikki vita um, kunnu gera vart við seg.

Bókaútsølan verður í døgunum 25. mars – 1. mai 2010.



*Nú stóra bókaútsølan verður annað hvørt ár, verður bókaútboðið eisini tað nýggjari*